# Messias oratoriið á Nesi og í Havn

**Leygardagin og sunnudagin kl 16 skipar Havnarkórið fyri konsert í Fríðrikskirkjuni og í Vesturkirkjuni. Solistar verða Ulrikke Syss, Elsa. Súsanna Dalsgaard, Ernst Sondum Dalsgarð og Ágúst Olafsson. Leiðari er Ólavur á Heyum Hátún**

KONSERT
*Tíðindaskriv*

MESSIAS er sokallað oratorium, kirkjuligt tónaverk, sum hevur sínar røtur í katólsku mótreformatiónini. Fólk møttust tá til uppbyggilig møtir í sokallaðum oratorium, sum merkir biðisalur. Hetta gav navn til bíbilskar tónleikaframførslur í hesum sambandi, sum løgdu støði undir hesa nýggju, máttmiklu tónleikagrein. Ikki er tað ov nógv sagt, at týskføddi og tónleikaliga italskt uppaldi onglendingurin Georg Friedrich Händel (1685-1759) meira enn nakar hevur skrivað oratoriir, sum saman við passiónunum hjá samtíðarmanninum J. S. Bach verða standandi eftir í tónleikasøguni, tá ið tíðarinnar tonn hevur gnagað so mangt annað burtur.

Heppið var tað fyri tey kirkjuliga tónleikaáhugaðu, at bretlandskongur í 1732 av pietistiskum ávum setti forboð fyri teatralskum framførslum av bíbliuhendingum. Händel, sum frammanundan hevði verið operukomponistur fram um allar, varð nú av umstøðunum noyddur til at geva sjálvari frásøgnini meira tyngd og persónunum eina djúpari lýsing.

Í flestøllum av hesum kirkjuligu verkum er tað søga Ísraels, sum verður lýst, so sum heitini eisini geva til kennara; „Esther", „Deborah", „Samson", „Joshua", „Saul", „Judas Makkabæus" og fleiri onnur. Men „Messias" hevur sína serstøðu. Her snýr tað seg ikki um at lýsa trupulleikar hjá einstøkum persónum, ella um hvussu eitt einstakt fólk, Ísraels fólk, verður fríað úr trongd og neyð; men um, hvussu øll mannaættin verður loyst frá synd og trega og reist upp á evsta degi. Teksturin og við honum musikalska íklæðingin lýsir søgu Krists frá fyrijáttan, føðing, lívi, deyða og fram til uppreisn.

Drúgt er verkið, eisini um, sum í hesum føri, ikki allir partar verða tiknir við. Men neyvan í allari tónleikasøguni er verk skrivað, sum soleiðis eins og ein perlurøð við sínum resitativu frásøgnum, sínum undurføgru solosangum (arium) og sínum mongu máttmiklu, ljómandi kórpørtum hongur organiskt saman frá byrjan til enda.

Händel skrivaði Messias, hetta, í fullari longd, tríggja tíma tónaverkið, í musikalskari og religiøsari ekstasu eftir bert trimum vikum, eitt bragd, sum tónleikasøgan ikki kennir makan til. Og um enn verkið var skrivað mitt í hansara virkistíð, í 1741, so gjørdist hetta verkið yvir øllum verkum, hann lat úr hondum. ár eftir ár varð tað framført undir tónaskaldsins leiðslu fyri stúgvandi fullum kirkjum og konserthølum, og 8 dagar, áðrenn hann doyði, var tann blindi og likamliga avmaktaði meistarin við til at framføra hetta sítt yndisverk.

Verkið hevur varðveitt sín tokka millum fólk, og ongantíð man hátíðarstundin kennast onglendingum sterkari, enn tá ið Halleluja-kórið enn í dag lyftir mannfjøldina ár sæti, eins og tað gjørdi á fyrsta sinni fyri ná meira enn hálvtriðja hundrað árum síðan.

## *Um solistarnar*



*Ulrike Sych* er fødd í Salzburg í Eysturríki. Sangútbúgving fekk hon á Mozarteum í Salzburg, í New York og í Italia. Hennara songskrá røkkur frá oratorium og kirkjutónleiki annars um klassiskan liedsong og operu til operettu og musical. Umframt hópin av konsertum, solistiskari luttøku í TV-Eurovision og luttøku á festivalum í Eysturríki, Italia, Luxemburg, Týsklandi, Grikkalandi, Turkalandi, Kasachstan og U.S.A. (New York International Fringe Festival) hava upptøkur og sendingar í sjónvørpum og útvørpum við Ulrike Sych verið í Bayrische Rundfunk, RVTU (Hollandi), CCTV (China Central TV í Beijing), TRT (Istanbul Radyosu & TV), NTV Istanbul og í ORF.

Ulrike Sych undirvísir bæði á Universität für darstellende Kunst í Wien og á Anton Bruckner Privatuniversität í Linz og er dosentur á altjóða meistaraskeiðum í sangi: Wiener Meisterkurse, Austrian Master Classes, Aristoxenes (Grikkaland).



Altsangarin *Elsa Súsanna Dalsgaard* er vælkend í klassiska tónleikaheimnum her á landi. Hon leyk prógv sum sangari á Det kgl. Danske Musikkonservatorium í Keypmannahavn og hevur síðan 2000 havt fast tilknýti sum kórsangari í norsku operuna í Oslo.

Í hesum starvi hevur hon mangan eisini havt solistuppgávur eitt nú í Requiem eftir A. Schnittke, S. Rachmaninoffs Vesper, Stabar mater eftir G.B. Pergolesi, La Traviata hjá G. Verdi og Dido & Aeneas eftir H. Purcell. Og nú seinasta vár sang Elsa Súsanna 1. Norn í gitnu Wagner-operuni „Götterdammerung".

Heima í Føroyum hava vit upplivað Elsu Súsonnu bæði á egnum konsertferðum og sum luttakandi í Summartónum. Í samarbeiði við Havnarkórið hevur hon eisini sett sín ljómandi dám á sum solistur í verkum sum Magnificat og Jólaoratoriinum eftir J.S. Bach, Händels Messias og Elias eftir Mendelssohn-Bartholdy



*Ernst Sondum Dalsgarð* hevur útbúgving sum sangari frá Det Kgl. Danske Musikkonservatorium í Keypmannahavn. Í 1995 fekk hann fast starv í Operakoret á Det Kgl.Teater og hevur síðan eisini havt stórar tenorleiklutir innan operuna. Soleiðis sang hann í 2003 Mario Cavaradossi í „Tosca", í 2004-2005 Rodolfo í „La Bohéme" og Prinsin í „Kærleikin til tær tríggjar appelsinurnar" eftir Prokofjiev. Seinasta ár (2007) var hann Edgardo í Lucia di Lammermoor". Ernst hevur júst verið á konsertferð í USA og hevur annars í ár við stórum fagnaði havt høvuðsleiklutin í „Cavallerina Rusticana". Umframt sítt starv á kongaliga leikpallinum í Keypmannahavn og sínar konsertferðir í onnur lond hava tað javnan verið boð eftir Ernst S. Dalsgarð til onnur operustøð í Danmark. Ernst hevur eisini vunnið sær navn burturi og heima sum evangelistur og solistur í kirkjuligum verkum sum Händels „Messiasi", „Jólaoratoriinum" eftir J.S.Bach, „Requiem" Verdis o.fl. Somuleiðis hevur hann frumframført mangt nútíðarverkið – soleiðis t.d. sum solistur í tónleikaverkinum „Ferðin" hjá Sunleifi Rasmussen til tekst eftir og heiðrandi minni um Jørgen Frantz Jacobsen.

Sum viðurkenning fyri sítt tónlistarliga virksemi hevur Ernst Sondum Dalsgarð fingið fleiri heiðursveitingar.



*Ágúst Ólafsson*, bassbariton, fekk sína byrjandi sangútbúgving í heimbýnum Reykjavík. Framhaldandi lærdi hann í Sibelius Akademiinum í Helsinki hjá Jorma Hynninen og Sauli Tillikainen. Samstundis søkti hann sær lærdóm í Týsklandi á skeiðum hjá heimsgitnu sangarunum Elisabeth Schwarzkopf og Dietrich Fischer-Diskau.

Ágúst hevur havt solokonsertir í Íslandi, Noreg, Svøríki, Finlandi og Týsklandi. Í altjóða sangkapping á Hugo Wolf Akademiinum í 2004 vann hann aðru virðisløn saman við pianistinum Izumi Kawakatsu.

Í operusangi hevur Ágúst Ólafsson havt gitnar leiklutir sum Don Giovanni og sum greivin í Brúdleipi Figaros í hesum operum Mozarts og sum Don Carlos í operu Verdis.

Annars er Ágúst javnan solistur í oratorium Bachs og Händels, og seinasta vár upplivdu vit hann sum bass-solist í Mozarts Requiem í Norðurlandahúsinum og í Christianskirkjuni saman við Føroya Symfonikóri og –orkestri, sum Bernharður Wilkinson stjórnaði.

Vágs Kommuna

## Pedagogur/hjálparfólk til Frítíðarskúlan í Vági

Søkt verður eftir avloysara fyri starvsfólk í farloyvi, at byrja 2. januar 2009 í tíðaravmarkað starv.

**Starvið umfatar:**
At arbeiða 25 tímar um vikuna.

Vit ynskja, at tú dugir at skapa ein tryggan og fjølbroyttan gerandisdag saman við børninum:
- Dámar væl at verða úti
- Ert kreativur
- Hevur gott foreldra og starvsfólkasamstarv.

**Lønarviðurskifti:**
Starvið er lønt sambært sáttmálanum millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Føroya Pedagogfelag.

**Meir fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Sørin Richardt, leiðara tlf. 374036/229482.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera býráðsskrivstovuni í hendi í seinasta lagi týsdagin 23. desember 2008 kl. 12.00. Merk umsóknina "pedagogur/hjálparfólk".

Um eingin pedagogur søkir, verður hjálparfólk sett ístaðin.

**Vágs Kommuna**
**Mentunarnevndin**